# Helmingurin av liðnum verður skiftur út



*Uni Arge er ein av leikarunum, sum ikki longur er at síggja á landsliðnum*

**Sammett við fyrra dystin ímóti Slovenia, sum er ein av teimum minnisríkastu hjá føroyska liðnum, so eru átta av átjan spælarum hesa ferð ikki teir somu**

LANDSLIÐSSØGA
*Jóannes Hansen*

Tað er stórur altjóða áhugi fyri uppgávuni, sum er á skránni hjá føroyska landsliðnum leygardagin. Tað er ikki so undarligt. Úrslitið verður avgerandi fyri, um tað verður Slovenia, ella um tað verður Russland, sum fer at enda á fyrsta plássinum í bólkinum og harvið beinleiðis kvalifiserar seg til HM endaspælið, sum komandi summar verður í Japan og Suðurkorea.

Sjálvandi er Slovenia stórur favorittur á heimavølli, og teir eru ikki minni favorittar, tá havt verður í huga, at fleiri av føstu spælarunum á føroyska liðnum eru ikki við á ferðini. Men kortini lúrir spenningurin. Tað ger hann partvís, tí Føroyar stóðu seg stak væl, tá útidysturin niðri á Balkan ímóti Jugoslavia 19. august bara endaði við 1–0 tapi, og tað ger hann uppaftur meiri, tí heimadysturin ímóti Slovenia endaði 2–2.

## Endavendu øllum

Heimadysturin ímóti Slovenia er ein tann minnisríkasti, sum føroyska liðið nakrantíð hevur spælt. Men tá tað bara restaðu fýra minuttir, bendi alt á, at talan var um uppgerð av tí slagnum, sum føroyingar á heimavølli so ofta hava verið annar parturin av.

Klokkan vísti 86 minuttir, tá Milan Osterc skoraði til 2–0. Fleiri áskoðarar vóru longu farnir til gongu, og eftir seinna málið reistust uppaftur fleiri. Talan hevði verið um hálv vánaligt avrik, har føroyingarnir høvdu spælt í 2. og 3. geari, og lagið á áskoðarunum hevði ongantíð verið, sum tað fleiri ferðir framman-undan hevði verið á Svangaskarði.

Men so var tað, at føroyska liðið av álvara tók sær um reiggj. Uni Arge longdi eitt fluktskot frá Jóhannisi Joensen, so bólturin fór í netið. Tá kom av álvara lív í. Skiltið hjá 4. dómaranum vísti, at tríggir minuttir vóru eftir. Slovenarnir skiftu fólk fyri at draga tíðina út. Klokkan vísti 47 minuttir, tá Allan Mørkøre tiltuskaði sær eitt fríspark eitt sindur til høgru fyri málið og úr seytjan metrum. Øssur Hansen sendi bóltin upp um manngarðin og í nettakið, slovenararnir góvu bóltin uppaftur, dómarin bríkslaði fyri síðstu ferð, og teir 3.200 áskoðararnir vildu í góðveðrinum ikki sleppa fantastiska róminum.

## Nógvar broytingar

Heimadysturin ímóti Slovenia var á skránni sunnudagin 3. september í fjør. Nú landsliðið er farið til Slovenia, kunnu vit staðesta, at allir átjan spælararnir, sum Allan Simonsen sendi boð eftir, eru í ferðalagnum.

Um vit sammeta við átjan manna hópin, sum vardi føroysku áhugamálini ímóti Slovenia fyri einum stórum ári síðani, so er talan um stórar broytingar. Átta av teimum átjan spælarunum, sum vóru við ta ferðina, eru ikki við í Slovenia.

3. september í fjør sá liðið soleiðis út: Jákup Mikkelsen – Hans Fróði Hansen, Óli Johannesen, Jens Kristian Hansen – Allan Mørkøre, Sámal Joensen, John Petersen (Jóhannis Joensen, 80.), Julian Johnsson, Øssur Hansen – Uni Arge, Todi Jónsson (Kurt Mørkøre, 58.).

Á beinkinum uttan at verða skiftir inn vóru Jens Martin Knudsen, Henning Jarnskor, Johan B. Hansen, Fróði Benjaminsen og Rógvi Jacobsen.

Av teimum fyrstu ellivu eru fimm ikki við í Slovenia. Allan Mørkøre hevur givið avboð, tí hann hevur ikki stundir, og Sámal Joensen og Uni Arge hava ikki verið upp á tal, tí teir hava ikki spælt síðani summarsteðgin. Julian Johnsson er leikbannaður, og Todi Jónsson er – fyribils í hvussu so er – givin á landsliðnum. Tað vil við øðrum orðum siga, at eingin av hesum fimm er ikki við í Slovenia, tí teir ikki eru úttiknir. Allan Simonsen hevur ikki havt møguleikan at gera av, um teir skuldu við ella ikki.

Jóhannis Joensen, sum varð skiftur inn, er ikki við, tí honum restar – orsaka av leikbanni – dystarvenjing. Henning Jarnskor hevur ikki verið á landsliðnum í ár. Í fyrstu atløgu var hann settur av. Í heyst hevur verið heitt á hann um at koma við aftur – Henning hevur alt kappingarárið verið sera sannførandi á GÍ liðnum – men nú hevur Henning borið seg undan.

Fróði Benjaminsen hevur verið fastur maður á miðvøllinum í ár, men hann er ikki við í Slovenia, tí hann er leikbannaður.

Enn er einki frætt um, hvussu liðið fer at síggja út leygardagin. Tað fara teir, sum umboða blaðið í Slovenia, ivaleyst at meta um í leygardagsblaðnum. Men – sum vit akkurát hava sæð – tað verður eitt heilt øðrvísi mannað lið, sum fer á vøllin, enn tann manningin var, sum 3. september í fjør syrgdi fyri einari av mest minnisríku løtunum saman við landsliðnum.



*Øssur Hansen, sum nú leikar við B93, hevur verið á landsliðnum síðani 1990*

# Skála fyrst til Sands

**Fyrri dysturin um eitt pláss í 1. deild verður sunnudagin á Sandi**

Um Skála fyri fyrstu ferð skal vinna rættin at luttaka í fremstu fótbóltsdeildini, ella um sandoyingar framvegis skulu eiga sessin, verður avgjørt tvey tey komandi vikuskiftini.

Fyrri dysturin verður á Sandi nú sunnudagin. Hann verður spældur klokkan 15, og tað verður Petur Skarðenni, sum skal halda skil á. Talan er um dómaran, sum inntil fyri stuttum nevndist Petur Hansen. Nú hevur hann gift seg til eftirnavnið Skarðenni.

Vit hava skilt, at sandoyingar høvdu viljað havt dystin framskundaðan til leygardagin, men tað hava teir á Skála ikki verið so hugaðir fyri. Tá bæði liðini ikki eru samd um at flyta ein av FSF ásettan dyst, so verður hann spældur upprunaliga ásettu tíðina.

Annað vikuskifti skal B71 inn á Skála at spæla.

**jh**





*Ronnie Samuelsen var ein av trimum leikarum, sum umboðaði tvey lið í bestu deildini hetta kappingarárið*

# Nøkur sekund í tveimum feløgum

**Tríggir leikarar umboðaðu tvey ymisk feløg í bestu deildini í 2001-10-02**

HAGTØL
*Ivan Eginsson*

Tey trý undanfarnu árini, hendi tað bert eina ferð um árið, at ein leikari skifti ímillum tvey fyrstudeildarfeløg, meðan kappingin var ígongd. Í 2001 hendi hetta heili tríggjar ferðir.

Ronnie Samuelsen byrjaði árið við B36, har hann fimm ferðir kom inn á vøllin í fyrru helvt í landskappingini. Undan summarsteðginum flutti Ronnie, ið er ættaður úr Vík, til EB/Streym. Miðvallarin fekk sjey dystir og tvey mál við uppflytarunum.

Mortan Hansen, ið annars er kendur sum NSÍ-leikari, skifti undan kappingarárinum til grannarnar í B68. Runavíkingurin í toftaálopinum skoraði tvey mál í sjey dystum fyri B68, men flutti síðan aftur til barndómsfelagið, har hann fyri tað mesta leikti í 2.deild. Men einaferð bleiv Mortan skiftur inn í 1. deildardysti og fekk sostatt átta dystir samanlagt við B68 og NSÍ í landskappingini-2001. Kappingarárið hjá Boga Petersen gjørdist sera merkisvert. Miðvallaleikarin av Saltnesi spældi fyri tað mesta í teimum lægri deildunum í 2001, fyrst við barndónsfelagnum B68 og so við NSÍ. Men hann fekk eitt sindur av spælitíð í fremstu røð kortini - Bogi var einaferð skiftur inn í yvirtíðini av dystinum B68-HB, og tað sama hendi í yvirtíðini av dystinum GÍ-NSÍ. Sostatt fekk Bogi Petersen bert nøkur fá sekund í 1.deild, men við tveimum ymiskum feløgum!

# B68 átti alla tíðina bronsuna

Vágbingar hildu seg hava vunnið bronsuna í fyrstu deild, tá dysturin móti Føroyameistarunum úr B36 var liðugur seinasta leygardag. Rómurin var øgiligur fram til ta løtu, tá tað frættist, at toftamenn høvdu javnað í seinastu sekundunum móti KÍ, og harvið sníktu seg eitt stig fram um VB.

Hóast vágbingar mundu iðra seg um hetta, so var tað í veruleikanum soleiðis, at frá teirri løtu, at Fróði Benjaminsen javnaði til 1-1 í Klaksvík í 35. minutti, var tað B68, sum átti bronsuna. B36 javnaði VB leiðsluna suðuri í Vági, áðrenn KÍ legði seg á odda í Klaksvík, og B68 javnaði KÍ leiðsluna aftur, áðrenn VB skoraði móti B36.

Trupulleikin var bara tann, at tá Útvarpið fyri seinastu ferð skifti til Vágs, var framvegis 2-1 í Klaksvík, og gleðisrómurin í Vági gjørdi sítt til, at boðini um útjavningina hjá toftamonnum ikki komu ígjøgnum, fyrr enn væl eftir dystin í Vági.

**-jm**

# Bjarni helst tann drúgvasti

**Aftur hetta kappingarárið var VB-málverjin í málinum í 18 ferðir 90 minuttir**

HAGTØL
*Ivan Eginsson*

*Bjarni Johansen hevur nú vart VB málið í 11.340 fyrstudeildarminuttir út í eitt, ella 189 tímar*



22 spælarar vóru á vøllinum í øllum átjan umførunum. Átjan teirra vóru við frá fyrsta bríksli hvørja ferð, og ellivu leikarar – Tað eru óvanliga nógvir - vóru við allar 90 minuttirnar í øllum átjan umførunum.

Merkisvert er tað, at helmingurin av feløgunum brúkti bert ein málmann í kappingini. Talan er um Jens Martin Knudsen (NSÍ), Meinhard Joensen (KÍ), Gunnar á Steig (EB/Streymur), Arturas Ramoska (FS Vágar), og so Bjarna Johansen (VB).

## Bjarni er drúgvur

Bjarni Johansen hevur spælt alla tíðina í øllum dystunum í bestu deildini síðan 1995. Spurningur er, um hetta er drúgvasta tíðarskeiðið nakrantíð í søguni av 1.deild í Føroyum. Sum kunnugt, hevur ein annar vágbingur, Pól Thorsteinsson, eitt líknandi met á landsliðnum – 17 dystir á rað uttan at vera skiftur út.

Øll lið, burtursæð árstalsfeløgunum B36, B68 og B71, hava í hvussu er ein leikara, sum var við alla tíðina í landskappingini-2001. Øll feløg, B68 undantikið, hava spælarar, ið vóru á vøllinum í hvørjum dysti.

Niðanfyri standandi yvirlit vísir, hvussu nógvir spælarar vóru við í øllum átjan umførunum, hvussu nógvir vóru við frá fyrsta bríksli allar átjan ferðirnar, hvussu nógvir spældu alla tíðina og hvørjir teir vóru.

| Lið | 18 d | byrj. | 90 min | navn |
|---|---|---|---|---|
| VB | 4 | 4 | 3 | Bjarni Johansen, Jón Pauli Olsen, Marek Wierzbicki |
| EB/Streymur | 4 | 3 | 2 | Gunnar á Steig, Alfred Jacobsen |
| GÍ | 3 | 3 | 2 | Henning Jarnskor, Leivur Hansen |
| FS Vágar | 3 | 2 | 1 | Arturas Ramoska |
| NSÍ | 3 | 1 | 1 | Jens Martin Knudsen |
| HB | 1 | 1 | 1 | Rógvi Jacobsen |
| KÍ | 1 | 1 | 1 | Meinhard Joensen |
| B36 | 2 | 2 | 0 | |
| B71 | 1 | 1 | 0 | |
| B68 | 0 | 0 | 0 | |
| í alt | 22 | 18 | 11 | |

# Jugoslavar halda við Føroyum

**Skal Jugoslavia sleppa í HM-endaspælið, krevst í minsta lagi eitt føroyskt stig leygardagin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fyri eitt fótbóltsstórveldi sum Jugoslavia, so er tað helst hugstoytandi at vita, at føroyingar sita við lyklinum hjá teimum, tá tað ræður um komandi HM-endaspælið.

Veruleikin er nevnliga tann, at Jugoslavia er í teirri truplu støðu, at teir ikki sjálvir kunnu avgera lagnu sína. Ístaðin er tað »lítlibeiggin« úr Slovenia, sum við einum sigri á Føroyum kann tryggja sær í minsta lagi tveir eyka dystir í undankappingini, og í øllum førum senda Jugoslavia heilt út í kuldan. Somikið væl hevur Slovenia staðið seg, at var tað ikki fyri ein javnleik á Svangaskarði fyri einum góðum ári síðani, so kundu slovenar við einum sigri leygardagin spælt seg beinleiðis til Japan og Korea.

## Alt kann henda

Jugoslavia skal leygardagin spæla móti Luksemburg, og hesa uppgávuna ivast teir ikki í, at teir eru førir fyri at loysa, men sum sagt, so mugu teir seta sítt álit á Føroyar. Hetta er kanska sera tungt at bera, men hinvegin, so eru vónirnar hjá jugoslavum ikki heilt ongar.

Á heimasíðuni hjá enska Premier-League felagnum, Tottenham, sigur jugoslaviski verjuleikarin, Goran Bunjevcevic, at Føroyar kunnu gera ein vørr.

- Tú veitst ongan tíð við fótbólti. Føroyar taptu tepurt í Russlandi, og vit megnaðu akkurát at vinna 2-0, men sjálvandi er tað ein kiksari hjá Slovenia, um teir ikki vinna dystin, sigur Bunjevcevic at enda.

# Venjarin kærdur

**Kæra er latin inn um atburðin hjá KÍ-venjaranum í seinasta dystinum í 2. deild**

KÆRA
*Jákup Mørk*

Rómurin var øgiligur, tá Skála fyri góðari viku síðani tryggjaði sær silvurmerkini í aðru deild, og samstundis vann sær rættin at spæla um eitt pláss í fyrstu deild komandi kappingarár.

Tað var sjálvsagt á skálamonnum, at lagið var gott, men hjá klaksvíkingunum var støðan ikki heilt hin sama. Umframt, at teir høvdu tapt dystin, so hildu teir einki serligt um dømingina, og eftir dystin gjørdi venjarin eisini vart við sína ónøgd.

Hetta hevur fingið dómaran í dystinum, Erling Eysturoy, at senda inn frágreiðing, har hann hevur greitt frá atburði venjarans, og kappingarnevndin skal nú taka støðu til, hvørt hetta skal revsast.

Úr Klaksvík frætta vit, at tey sum heild høvdu ilt við at fylgja linjuni hjá dómaratríbólkinum, og at tey ivast í, um tey yvir høvur fara at geva nakra sum helst frágreiðing um tilburðin, soleiðis sum kappingarnevndin annars hevur biðið tey gjørt.